# Tjóðveldi hevur javnstøðu á tingi



Í sambandi við at Høgni Hoydal og Sjúrður Skaale er í farloyvi frá løgtingsarbeiðinum, hava tvey eykafólk tikið sæti á tingi fyri Tjóðveldi. Tey eru Páll á Reynatúgvu og Heidi Petersen, sum bæði hava verið vald á ting fyrr. Á tann hátt hevur tingbólkur Tjóðveldisins fulla javnstøðu, fýra menn: Tórbjørn Jacobsen, Páll á Reynatúgvu, Heini O. Heinesen og Hergeir Nielsen - og fýra kvinnur: Annita á Fríðriksmørk, Heidi Petersen, Bergtóra Høgnadóttir Joensen og Bjørt Samuelsen.

# Landsstýriskvinnan á skúlavitjan

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, vitjar í hesum døgum á fólkaskúlum kring landið. Endamálið er at kunna seg um umstøðurnar á staðnum og fáa ráð og vegleiðing frá skúlaleiðslunum um m.a. skilagóðar bygnaðarbroytingar og námsfrøðiligar spurningar. Týsdagin 9. mars hevði landsstýriskvinnan fundir við skúlaleiðslurnar í Vágunum og vitjaði á skúlunum á Giljanesi, í Sandavági, Miðvági og í Sørvági. Hon vitjaði eisini leiðslurnar á skúlanum í Klaksvík, í Hvannasundi og á Viðareiði, og fríggjadagin varð farið inn á Skálafjørðin, har vitjað verður á skúlunum á Toftum, i Runavík, á Skála og á Strondum.

væntar, at parturin verður ikki minni í ár.

- Marknaðurin í USA byrjaði fyri okkara viðkomandi so smátt at veksa í 2008, og í 2009 nærmast eksploderaði hann, sum Frederik tekur til.

Tað er serliga partur yvir beinleiðis veitingar til viðskiftafyritøkur á amerikanska marknaðinum, sum vaks so nógv í 2009.

Frederik Hansen sigur, at nógv tann størsti parturin av útflutninginum til USA er feskur laksur, sum eitt nú sushi-matstovur hava í sínum útboði.

- Orsøkin til, at føroyskur laksur er so umtóktur á hesum matstovum, er, at hann verður mettur at vera so heilsugóður. Fóðurið er úr fiski, og tí hevur fiskurin eisini góðan smakk, samstundis sum innihaldið av omega3 feittsýrum er stórt.

Fóðurið, sum Havsbrún framleiðir til alivinnuna, er úr fiskavørum við at kalla ongari uppíblanding, meðan aðrir fóðurframleiðarar eitt nú brúka meis og korn sum uppíblanding.

Sum skilst, er einki galið við fóðuri, sum hevur hesa uppíblanding, men smakkurin á fiskinum er ikki hin sami.

Frederik Hansen vísir á, at eitt nú gjaldoyraviðurskifti og onnur viðurskifti kunnu ávirka amerikanska marknaðin í ár eins og aðrar marknaðir, men hann væntar, at hesin marknaður verður líka góður í ár sum undanfarna ár.

- Okkara fyritøka kann soleiðis rokna við at selja fyri einar 100-150 miljónir krónur á amerikanska marknaðinum í ár, sigur søluleiðarin a Bakkafrost, Frederik Hansen.

# Prospekt er gjørt yvir møguleikar í Fuglafirði



**Fuglafjarðar býráð arbeiðir miðvíst við at skapa grundarlag fyri einum uppisjóvarvirki til matvøruframleiðslu og ymiskum øðrum møguleikum fram við havnalagnum, og nú hevur Farec International gjørt eitt prospekt ella eina frágreiðing yvir ymiskar møguleikar**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fuglafjarðar býráð hevur nú tikið ítøkilig stig til, at Fuglafjørður fær eitt uppsjóvarvirki til matvøruframleiðslu. Visjónirnar hjá býráðnum eru stórar, og lagt verður upp til, at Fuglafjørður kann gerast ein altjóða maritimur depil fyri móttøku, framleiðslu og tænastuveitingum til allar sjóvinnur.

Borgarstjórin í Fuglafjarðar kommmunu, Sigurd Simonsen, hevur um dagarnar kunnað sínar borgarar um, hvørjum býráðið ítøkiliga hevur arbeitt við í seinastuni. Hetta hevur hann gjørt á heimasíðuni hjá kommununi.

- Fólk spyrja, hvat tað er, vit havast at, og tí kenna vit tað sum okkara skyldu í fyrsta lagi at kunna okkara borgarar, sigur hann við Sosialin.

## Konsulenthjálp

Fyri hálvum ári síðan samtykti Fuglafjarðar býráð at brúka konsulenthjálp til at gera eina frágreiðing – ella eitt prospekt – sum kann lýsa partar av grundarlagnum fyri einum uppisjóvarvirki í Fuglafirði.

Farec International við Óla Samró, búskaparfrøðingi, fekk hesa uppgávu, og í farna mánaði varð frágreiðing løgd fyri býráðið í Fuglafirði. Eisini varð uppskot til eina 20 ára útbyggingarætlan fyri Fuglafjarðar havn, sum er gjørt saman við býráðsfyrisitingini, lagt fram á hesum fundi.

## Íleggjarar neyðugir

Sigurd Simonsen sigur, at hin 1. mars varð prospektið saman við útbyggingarætlanini lagt fyri eitt væl uppmøtt stjóralið úr lokalu vinnuni.

- Hin 4. mars samtykti býráðið so at fara víðari við málinum og royna at fáa áhugaðar íleggjarar til at gera íløgur í eitt nýtt matvøruvirki til uppiosjóvarfisk í Fuglafirði, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri.

# Misjavnt við snellu á Norðhavinum

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gongur misjavnt hjá bátunum, sum royna við snellu eftir várfiski á Norðhavinum.

Á Bátafiski á Eiði siga tey, at tað hevur viðrað illa summar dagar, men tá roynandi er, einir 20 bátar við snelluu.

Bátar, sum avreiða á Eiði og eitt nú í Sørvági, hava fingið upp í eini 2000-3000 pund, tá tað hevur vignast best.

Nakrir glastrevjabátar royna eisini við línu og avreiða á Eiði.

Fiskiskapurin hjá eitt nú Gunnvá og Gortrúgvanum hevur eydnast sera væl summar dagar, og tá best hevur ligið fyri, hava teir fingið upp í eini 12.000-13.000 pund á setuna.

Bátarnir seta einar 50-60 stampar hvørja ferð, og soleiðis hava teir onkrar dagar fingið meiri enn 200 pund á línuna.

Tað er rættiliga góður línuútróður.

Á Bátafiski á Eiði siga tey, at so at siga øll veiðan hjá bátunum bæði við línu og snellu er toskur.

